# Stig Rossen í kirkju í Klaksvík á motorsúkklu









*Stig Rossen kom í kirkju í Klaksvík á motorsúkklu*

**Sunnudagin var Stig Rossen í kirkju í Klaksvík – á motorsúkklu**

HUGLEIÐING
*Dávur Winther*

Kendi danski sangarin Stig Rossen hevði eina konsert í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið – Útselt varð og áhoyrarnir vóru sera væl nøgdir við konsertina.

Á ferð til Føroya í flúgvara fríggjadagin, sum vegna vánaligt veður gjørdist nakað long, fall eg í prát við Stig Rossen. Vit samskiftu um sang og tónleika, ið hann hevur eina langa røð av áhugaverdum upplivingum at siga frá - líka frá Grand Prix, samstarv við symfoniorkestrum, sjónvarpssendingum og CD's.

Eisini hevur Stig lagt sær nýggja yrkisleið sum fyrilestrarhaldari: "Livet skal ikke leves på automatpilot". Hann hevur skivað bók um evnið; tí nógvir av hansara leiklutum av góðum grundum eru endurtøkur í hópatali – tá er umráðandi ikki at missa áhugan og innlivingina í arbeiðinum.

## Engagementið

Hvussu leggur tú lunnar undir ein "rættan dag" og skapar tær styrki og orku til ein slíkan? Hetta er leikur í dagligdegnum, sum Stig Rossen rættiliga hevur tikið til sín, og kann geva av bæði við fyrilesrum. Tú kanst eisini lesa um evnið í bók hansara: "Livet skal ikke leves på automatpilot".

Hesum fekk Stig sanniliga eisini brúk fyri, tá ið hann heilar 1478 ferðir leikti høvuðsleikin sum tann fyrverandi fangin Jean Valjean í víðagitna musicalalinum Les Misérables.

Eg helt tí fyri við Stig Rossen, at skalt tú til Føroya at syngja, so mást tú uppliva Klaksvík við teimum vøkru fjøllunum og ikki minst heimsins vakrastu kirkju, sum samstundis er besta konserthøli í Føroyum, Christianskirkjan.

– Det lyder da spændende! Var svarið. Stig fekk kort mítt og kl. 10.45 sunnumorgunin ringdi telefonin:

– Hej Dávur; jeg står i Klaksvík nu! .

Vit fingu tíð at svølgja ein hálvan kaffimunn og so í Kirkju. Stig var komin í høslag við Ove ritter frá Harley-Davidson-klubbanum í Tórshavn. Hann skeyt upp, at teir koyrdu til Klaksvíkar á Harley-Davidson súkklum. Í Klaksvík tók Bogi Joensen frá Norðoya MC-felag í móti. Við í ferðini til Klaksvíkar vóru eisini Hilmar Augustinussen og Thomas, sum er ljóð- og reklamumaður hjá Stig Rossen.

Tá ið guðstænastan varð liðug, fór Stig fram í kór og sang eitt lítið lag. Det må jeg sige! Hetta er ein frálík kirkja, vøkur og annarleiðis og sera góð at syngja í. Her vil eg sera fegin syngja til eina konsert eina aðra ferð, segði ein glaður og bergtikin Stig Rossen.

Hetta var fyrsta guðstænastan hjá Hanusi Simonsen í Klaksvík – Hanus er ættaður úr Klaksvík.

Hanus tók í hondina á øllum og ynskti teimum ein góðan sunnudag. Og nógv høvdu vinarliga orð at bera Hanusi. Stig Rossen heilsaði eisini uppá og takkaði fyri góða høvið at hitta kirkjununa.

Hanus kendi ikki rættiliga mannin beinan vegin. Men tá ið vitið rann við prest, segði Stig eitt sindur umberandi: "Eg plagi ikki at fara í kirkju í motorsúklubúnað".

"Nej, nemlig"! svaraði Hanus Simonsen, prestur við hansara eyðkenda